

# KT-fólk

Tórshavnar kommuna søkir eftir KT-starvsfólki til KT-deildina.

**Kt-deildin**
KT-deildin heldur til á Glade Hjørn, og her starvast 8 fólk. Deildin umsitur alla kunningartøkni, herundir telefoni hjá fyrisitingini og stovnum hjá Tórshavnar kommunu. Flestu kommunalir bygningar eru bundnir í eitt felags net. Í løtuni er talan um 130 bygningar, og umleið 600 teldur og 200 prentarar eru knýttir í fyrisitingarnetið. Okkara servarar eru virtualiseraðir á VmWare, og data verða goymd á einum SAN. Í næstum verður Citrix rullað út á tunnum klientum, og eftirfylgjandi umsita vit restina av teldunum á MS SMS. Vit umleggja okkara tráðleysa net, so tað verður tryggari og lættari at umsita.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum**
Arbeiðsøkið er umsiting av skipanum og databasum. Tú kemur at hava samskifti við veitarar um menning av skipanum, herundir at gera kravlýsingar. Tú verður við, tá kommunan samskiftir við veitarar um skipanir.

Tú kemur at arbeiða í einum toymi, sum umsitur alla kunningartøknina (teldur, prentarar, netútgerð, osfr.) í framkomnum skipanum. Tú ert við til at manna Kt-skivuna (Service Desk), og tú kemur eisini at menna førleikan hjá okkara brúkarum, eins og politikarum. Økið er í menning, og nýggjar spennandi avbjóðingar standa fyri framman, herundir umskipan av deildini.

**Førleikakrøv**
Vit leggja dent á, at tú er útbúgvin teldustøðingur. At tú hevur royndir innan Microsoft forritini, er ein fyrimunur eins og royndir innan tænastuveiting.

**Persónligar eginleikar**
Umsøkjarin má vera røkin, duga at arbeiða sjálvstøðugt, vera til reiðar at taka eina hond í, tá á stendur og til at avloysa hini á deildini.

**Kommunan bjóðar**
Eitt áhugavert starv við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum, góðari fakligari og persónligari menning, ein viðhvørt strævnan dag og eitt hugnaligt og inspirerandi umhvørvi.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Inga Ellingsgaard, KT-leiðara, telefon 30 20 10 ella við at senda teldupost til ingi@torshavn.fo.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 6. mars 2008, kl 12. Merkið umsóknina „KT-starvsfólk".

**Tórshavnar kommuna**

---

MVH P/F | Á HJALLA 15 | TELEFON 363800

MVH
MASKINVERKSTAÐURIN Á HJALLA

# ENTREPRENØRMASKINMEKANIKARI

**Entreprenørmaskinmekanikari**
Entreprenørmaskinmekanikarin er partur av einum starvsliðið á verkstaðnum á Hjalla sum m.a. hevur mekaniskan, eltekniskan og hydrauliskan førleika. Umsøkjarar við øðrum førleika, so sum lastbilmekanikarar o.a. eru vælkomnir at søkja.

**Arbeiðsøkið**
Arbeiðið á verkstaðnum á Hjalla er í høvusheitinum umvælingar uppá entreprenørmaskinir. Nógvar aðrar uppgávur verða eisini loystar á verkstaðnum, t.d. stálarbeiðið, eftirlitsarbeiði á lyftir o.a.m.

Í løtuni eru 6 starvsfólk á verkstaðnum.

**Tín førleiki**
Vit søknast eftir einum persóni við útbúgving og royndum innan omanfyrinevnda øki.

**Løn**
Lønin verður ásett sambært nærri avtalu.

Hevur tú áhuga í hesum starvi, er tú vælkomin at ringja til Klæmint Weihe, á 216644 ella senda teldupost til kw@mvh.fo

**MVH P/F**
Á Hjalla 15
Telefon 363800

**UM OKKUM**
MVH er nýstovnað felag, sum hevur til endamáls at umboða kend merkir innan entreprenørmaskinur m.a. Komatsu og Hydrema og Volvo bussar og lastbilar umframt at reka verkstað. Vit hava sett okkum sum mál, at gerast førandi innan verkstaðstøkni á sjógvi og landi. Fyri at náa hesum endamáli, er neyðugt við dugnaligum starvsfólki og góðum hølisviðurskiftum. Tað er tí planlagt at byggja nýggja verkstaðshøll á Hjalla, soleiðis at fyritøkan eisini kann verða samlað á einum stað seinni í summar.

---





Sp/f ZARTEC Bygging Tlf. 226459
V/ Heðin B. Nielsen Tlf. 226469
Húsasmiður